

# ...Tarin er føroyska grannið

**Í blómuhandlinum Árstíðirnar, sum Brynhild Dalsgaard eigur, hava tey úr at gera til jóla. Dekoratiónina rópar Brynhild fyri »Føroysk jóladeko«. Hon hevur brúkt trý ymisk sløg av tara, umframt mosa, lyng, goggur og skeljar. Dekoratiónin er fest á leir og stendur á einum steini úr granitti**



TARIN

*Havbotnurin kring Føroyar er summastaðni bjálvaður við einum skógi av reyðbrúnum og svørtum tarasløgum, sum toyggja seg fleiri metrar upp í sjógv.*

*Niðri í djúpinum dansar tarin tonglatango við sjóvarfallinum, og dandandi bendir hann seg upp móti vatnskorpuni, fyri at leska sær eina sólarglæmu*